**Skúlastýrisfundur nr. 3**

Stað: Skúlin á Argjahamri, Stórastova

Dato: 13.05.2025

Møtt á fundi:

Ása Chirstiansen, skúlastýrisforkvinna

Guðrun Kerá, foreldraumboð

Paula Neshamar Thomassen, foreldraumboð

Anita á Fríðriksmørk, kommunustýrisumboð

Høgni Vilhelmsen, kommunustýrisumboð

Lovisa Niclasen, læraraumboð

Marin S. Bláberg, skrivari

Mál á skrá:

| | |
|---|---|
| Foreldraumboðini verða kunnað um nýggja telefonpolitikkin hjá skúlanum | Forkvinnan tosaði við foreldrini og kunnaði tey um, hvørjar ætlanir skúlastýrið hevur viðvíkjandi telefonum komandi skúlaár.<br>Hon kunnaði eisini foreldrini um, at ein mannagongd verður løgd á heimasíðuna.<br>Hon legði dent á týdningin av, at foreldur og skúli tosa jaligt um telefonforboðið. |
| Kunning um næmingaráðið<br><br>Skúlin hevur tvey næmingaráð. Eitt í miðdeild og eitt í hádeild. | Skúlastjórin kunnaði skúlastýrið um arbeiðið hjá næmingaráðunum. Kunnað varð eisini um, hvat tey høvdu fingið burturúr.<br>Næmingaráðsval verður aftur í september 2025 |
| Kunning um starvssetanir | Skúlin hevur koyrt starvslýsing út eftir bæði lærarum og námsfrøðingum í skúla, forskúla og Ljósástovu. Í Ljósástovu skal nýggjur leiðari setast, meðan nýggjur varaskúlastjóri skal setast í skúlanum. |

| | |
|---|---|
| 8.a hevur sent umbøn inn at fara námsferð til onnur lond enn norðurlond. | 8.a ynskir at vita, um tað ber til at velja onnur lond enn norðurlond. Tey biðja eisini um loyvi til, at upphæddin fyri ferðaútreiðslur fer upp um 5000 kr.<br><br>Skúlastýrið mælir til, at vit halda fram, sum vit gera nú í eini 3 ár fram.<br>Mælt verður eisini til at hava eitt hámark á, tá tað kemur til lummapening. |
| Privat tlf. nr. hjá starvsfólki | Limur í skúlastýrinum hevur reist málið at sletta privat tlf. nr. hjá starvsfólki á heimasíðuni. Orsøkin til tess er, at fleiri starvsfólk hava upplivað, at næmingar ringja fyri at gera ónáðir.<br><br>Skúlastýrið tekur undir við umbønini hjá skúlastýrisliminum. Skúlastjórin skal syrgja fyri, at heimasíðan verður broytt, soleiðis at privat tlf. nr. ikki longur eru til taks á heimasíðuni. |

Fundartíð: 16.00-19.00

Næsti fundur verður 2. september 2025